# RAKAR BARA SUÐUROY

**ELDRARØKT** Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki, at suðuroyingar skulu vera teir einastu, sum fáa spariknívin hjá samgonguni at smakka næsta ár

Áki Bertholdsen

- Tað er óvirðilgt at seta sparingar í verk í óðum verkum, uttan at kanna avleiðingarnar og uttan at kanna aðrar møguleikar.

Tað staðfestir Tvøroyrar Býráð.

Býráðið hevur havt fund um sparingarnar, sum Rósa Samuelsen hevur í hyggju at seta í verk á eldraøkinum í Suðuroy næsta ár.

Hon ætlar, at átta tveymannakømur á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimið skulu gerast um til einmansstovur.

Tað merkir, at so hvørt fólk á tveymannakømrum fella frá, flytir ongin nýggur inn.

Tað merkir at átta pláss verða færri á heiminum og næsta ár skal tað føra eina sparing við sær upp á 2,7 milliónir.

Ein avleiðing av tí verður, at upp ío 10 ársverk skulu sparast burtur á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi, men av tí, at so nógv arbeiða niðursetta tíð, verður tað upp til 15 fólk, sum missa starvið.

Men tað fær esini avleiðingar fyri nýggja ellis- og røktarheimið, sum verður bygt í Vági, tí tá ið tað letur upp næsta ár, verður tað ikki við fullum kapasiteti fyri at tryggja, at sparingin næsta ár verður rokkin.



**Í ÓÐUM VERKUM**

*Tað er ikki rímiligt, at tað bara verður Suðuroyggin, sum skal merkja sparingarnar, heldur Tvøroyrar Býráð*

Tað kemur meiri og meiri undan kavi um spariætlanina og tað nýggjasta er, at næsta ár fara hesar sparingarnar bara at raka Suðuroynna.

Ætlanin er at niðurleggja fleiri tveymannakømur á eldraheimum kring landið, men tað verður ikki fyrrenn í 2012, at sparingar skulu setast í verk í Klaksvík og í 2013 skulu tær setast í verk í Vestmanna.

Tað hendir so hvørt tey nýggju heimini, sum verða bygd har, verða tikin í brúk.

Tað visti borgarstorin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, sum eisini er formaður í stýrinum fyri Suðuroyar Ellis- og Røktarheim at upplýsa fyri býráðnum.

Og Tvøroyrar Býráð vil ikki góðtaka, at Suðuroy skal vera einasta pláss í landinum, sum verður rakt av sparingum.

- Verða sparingar framdar í Suðuroy næsta ár, hava vit als onga vissu fyri, at somu sparingar verða settar í verk aðrastaðni í 2012 og í 2013, siga Býráðslimir á Tvøroyri.

Er tað avgjørt neyðugt at spara, mæla teir heldur til, at sparingarnar upp á 2,7 milliónir verða býttar ímillum øll heimini í landinum, tí so verður so lítið í part at spara.

## Alt ov illa lýst

Tvøroyrar Býráð heldur eisini, at spariætlanin er so illa lýst, at hon reisir nógv fleiri spurningar, enn tað eru svar.

Eitt nú vildi Jaspur Vang hava at vita, hvussu bíðilistar síggja út og tað er býráðið samt við honum í.

Býráðið vil eisini vita, hvør skal gera av, hvør sleppur í nýggja heimið í Vági at búgva og, hvør verður setanarmyndugleiki, tá ið størv skulu setast.

Tað eru tær fýra kommunurnar í Suðuroyar syðru helvt, sum byggja ellis- og røktarheimið, sum verður bygt í Vági.

Men Tvøroyrar Býráð við eisini hava at vita, hvussu treytirnar verða, tá ið fólk úr øðrum kommunum fáa búpláss á heiminum og, hvør skal betala fyri tey.

- Hetta eru spurningnar, sum Nærverkið ikki hvur svar upp á í løtuni, sigur borgarstjórin á Tvøroyri og formaðurin í stýrinum fyri Suðoyroyar Ellis- og Røktarheim.

*aki@sosialurin.fo*

### » Hvør skal betala, tá ið fólk úr norðaru helvt fara á heimið í Vági?

**Rakar bara Suðuroy**

## Rósa tigur

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, Rósa Samuelsen, hevur onga viðmerking til málið, tí tað er til politiska viðgerð í samgongini í hesum døgum.

## 1365 krónur

Prísurin fyri eitt búfólk á einum ellis- og røktarheimið er 1365 krónur.

Hetta er tann játtanin, sum heimini fáa fyri hvørt búpláss.

Hóast ein song á einum sjúkrahúsi kostar fimm ferðir so nógv, eru tað fleiri røktarsjúklingar, sum eru meiri og minni varandi innlagdir á sjúkrahús, tí tað er ikki pláss fyri teimum á nøkrum eldraheimi.

# Tørvur á minst 20 plássum afturat

Í Suðuroy er tørvur á minst 20 búplássum afturat á ellis- og røktarheimum.

Tað vísir ein nýggj uppgerð, sum Suðuroyar ellis- og Røktarheim hevur gjørt saman við Nærverkinum fyrr í summar.

Annars hevur Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, upplýst, at tað er bara bráðneyðugur tørvur á plássum til sjey fólk á ellis- og røktarheimum í Suðuroy.

Hetta váttar Anna Djurhuus, leiðari á Suðuroyar ellis- og røktarheimið eisini.

Men hon sigur, at hetta skal takast við einum ávísum fyrivarni.

- Her er bara talan um røktarsjúklingar, sum liggja innlangdir á sjúkrahúsi, tí onki pláss er fyri teimum nakrastaðni á ellis- og røktarheimi.

Annars sigur hon, at tey hava ein bíðilista upp á 13 afturat fólk, sum eru so vánalig, at tey eiga at sleppa á eitt ellis og røktarheim.

Her er talan um fólk úr allari Suðuroy.

Men harumframt hevur Suðuroyar ellis- og røktarheim eisini 25 aðrar umsóknir liggjandi frá fólki, sum nokk ikki hava bráðneyðugan tørv at fáa búpláss.

Her er talan um fólk, sum kortini ikki eru betri fyri enn so, enn at summi av teimum eru til umlætting á ellis- og røktarheiminum av og á fyri at lætta um hjá familjuni.

Annars klára tey seg heima við heimahjálp og við hjálp frá familju.

- Men síðani listin varð uppgjørdur fyrst í juli, eru nøkur av teimum eisini blivin so vánalig, at tey kundu saktans komið á heimið at búð, sigur Anna Djurhuus.

### » Tað eru bara suðuroyingar, sum skulu spara næsta ár

# Vilja búgva saman

Tað er óvirðiligt, at fólk, sum onki hava við hvørt annað at gera, verða tvingað at búgva saman á tveymannakamari á elliso og røktarheimum.

Tað er grundgevingin hjá Rósu Samuelsen fyri at niðurleggja tveymannakømrini á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi.

Hesum er Anna Djurhuus, leiðari á ellis- og røktarheiminum á Tvøroyri, púra samd um.

Men hon sigur kortini, at tað kemur fyri í ávísum førum at tvey eldri vilja búgva saman, hóast tey ikki kennast.

Men hon leggur kortini afturat, at hetta er undantaktøk

- Tað eru nøkur, sum eru ótrygg at vera einsamøll og tí vilja tey heldur búgva á tveymannakamari, sigur hon.